





*Hesar myndir eru frá Polar Princess, har Leivur á Rógvi úr Vestmanna er skipari. Teir hava fiskað av eini royndarkvotu uppá 600 tons av toski í Eysturgrønlandi. Teir vóru at byrja við bert 24 mans. Teir brendu í rokfiskarí beinanvegin, teir komu á fiskileið, og umstøðunar vóru góðar við ongum ísi. Tóðini vóru stutt, 2-5 min., so var fult av stórum og feitum toski. Ta fyrstu vikuna fingu teir 177 tons niður av flaki. Tann minsti fiskurin, sum máldur var, var 67,0 cm. Annars var meðal longdin frá 97 cm til 1,3 m. Vektin var upp til 30 kilo. Toskarnir vóru fullir av rogni. Okkurt hálið gav 50 kurvar bara í rognum. Teir máttu bróta túr av og fara til Íslands eftir 10 monnum, sum ikki sluppu við frá byrjani vegna floglíkindindi í Grønlandi. Kvotan varð uppfiskað eftir 13 døgum. Nú eru teir á svartkalva , so verður farið í Barentshavið eftir restini av toskakvotuni, teir eiga har.*

kom inn til Nuuk í dag at landa. Teir hava fulla last.

**29. apríl**
Í dag eru - 3,3 stig og stilli. Akamalik loysti til nýggjan túr aftaná døgurða í dag. Lómur kom inn við fullari last, gott 123 tons. Teir skulla byrja at landa í morgin. Ja aftur hesa ferð bleiv ein trolari snýttur av Air Greenland. Onki toppstykki kom í dag til Nanok Trawl. Í morgin er lovað teimun, at teir fáa vøruna. Her er onki vist, fyrrenn at vøran liggur við síðuna av skipinum á kajuni. Soleiðis eru okkara viðurskifti í 2007.

**30. apríl**
Í dag eru –0,6 stig og stilli. Tasermiut kom inn í morgun at millumlanda. Teir hava knapt 300 tons inni. Tann nýggi skeljabáturin Louise L kom inn í morgun. Eitt snotuligt skip at líta á. Tað er nakað væl størri enn skipið, sum teir eru komnir í staðin fyri. Teir hava nakað av smátrupulleikum í maskinuni, og rokna við at sigla í morgin. Teir smærru bátarnir fáa nógvar rækjur. Teir koma søkkladnir inn at landa. Teir mugu eisini bíða við toli at koma framat at landa.

**1. mai**
Deilurin til Nanoq Trawl kom í dag, og teir loystu í kvøld aftur. Ikki vóru teir komnir langt út, so máttu teir venda við aftur. Tað var okkurt galið við turbin.

**2. mai**
Í dag eru – 0,3 stig og dýrdarveður. Qaqqatsiaq kom inn at landa í morgun. Teir hava fulla last inni. Polar Timjarmiut kom inn higar eftir einum troli og fóru so víðari til Nuuk at landa. Har er alt fult, sum fyllast kann. Teir hava roynt í 12 dagar. Teir verða til landingartíð í morgin. Ocean Tiger er í Nuuk og landar í dag. Lómur loysti nýggjan túr í dag

Hetta vóru tíðindini hesa ferð.

KAUPTHING BANK



# Partabrøv sterk

MARKNAÐARRÁK

Partabrævamarknaðirnir vístu styrki í farnu viku. Amerikanska arbeiðsmarknaðarfrágreiðingin fyri apríl vísti ein arbeiðsmarknað, sum var nakað veikari enn væntað. Hóast hetta hildu partabrøv flest alla staðni, eisini í USA, á at hækka. Amerikanski marknaðurin hækkaði 1,1%, evropiski 2,1%, og japanski 1,8%. Støðan á amerikanska arbeiðsmarknaðinum hevði minni at siga fyri íleggjarar enn inntøkurnar hjá amerikonsku virkjunum. Nú hava 407 av teimum 500 virkjunum í vísitalinum S&P500 kunngjørt roknskap fyri fyrsta ársfjórðing, og úrslitið er væl betri enn væntað. Inntøkurnar eru í miðal øktar við 8,6% seinasta árið, og heili 276 virkir hava kunngjørt betri úrslit enn væntað. Hetta er gott 2/3 av virkjunum. Hetta eru góð tíðindi fyri partabrævamarknaðirnar.

## Trýstið á dollaran minkað eitt vet

Góð arbeiðsmarknaðartøl úr USA fríggjadagin, fekk trýstið á dollaran at minka eitt vet og hann verður í løtuni handlaður á kurs 1,36 mótvegis evruni. Hetta liggur nær lægsta markinum frá apríl 2007 ið var 1,368. Væntandi fer dollarin komandi dagarnar at sveiggja í geiranum 1,355 og 1,367. Hesa vikuna verða tað serliga niðurstøðurnar frá rentufundunum í USA mikudagin og í Evropa hósdagin sum kunnu ávirka kursin.

## Lánsbrævarentur støðugar

Lánsbrævarentur hava aftur verið støðugar hesa farnu vikuna. Seinasta mánaðin hevur 10-ára rentan sveiggjað millum 4,17%-4,26%. Nú rentan er hækkað um 0,30% síðan mars, bíða íleggjarar eftir tíðindum, sum kunnu flyta marknaðin aftur.

## Hesa vikuna

Hesa vikuna verða amerikanski tjóðbankin, Fed, og evropiski miðbankin, ECB, í andgletti. Báðir halda fund hesa vikuna, og stórur áhugi er á marknaðunum fyri, hvørjar metingar tey gera sær eftir fundirnar. Marknaðirnir vænta ikki nakra rentuhækking á hesum sinni.

**Donsk 10-ára renta**




**Vísital fyri norrøn partabrøv**




**Gjaldoyru**

| | Kursur | +/- % | |
|---|---|---|---|
| USD | 547,87 | 0,3% | ⇧ |
| JPY | 4,56 | -0,1% | ⇩ |
| GBP | 1.091,85 | 0,0% | ⇨ |
| NOK | 91,64 | -0,1% | ⇩ |
| SEK | 81,18 | -0,4% | ⇩ |

**Virðisbrøv**

| Norrøn | Kursur | +/- % | |
|---|---|---|---|
| Lánsbrøv í DKK | 95,74 | 0,0% | ⇨ |
| Norrøn Partabrøv | 138,87 | 2,3% | ⇧ |
| **VMF** | **Kursur** | **+/- %** | |
| Atlantic Petroleum | 825,00 | 14,2% | ⇧ |
| KB Trygg Eurostoxx | 110,85 | 0,4% | ⇧ |

*Broytingar eru útroknaðar í mun til fyri viku síðan. Myndirnar vísa gongdina seinastu 3 mánaðirnar.*

*Vika19 2007*